

## Fyribils venjarar í Burnley

Í farnu viku spældi enska felagði Burnley av við venjaran Owen Coyle, sum skifti til Bolton at starvast. Burnley hevur ikki funnið eina varðandi loysn á venjaraspurninginum enn, men hevur sett tveir venjarar í størvini fyribils. Annar er talentovastin Martin Dobson, og hin er ungdómsvenjarin Terry Pashley. Burnley er í holt við at leita eftir nýggjum venjara, sum kann leiða liðið ígjøgnum seinnu hálvu av Premier League.



Joen Pauli Høgnesen var saman við Bjarti Hansen á ávikavist bakki og vongi í høgru síðu ein støðug plága fyri verjuna hjá strandingum

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## StÍF-VÍF 25-28 (10-13):

# Teir ungu gingu undan

**Hóast StÍF byrjaði betur, vendist ikki aftur, tá VÍF hevði tikið yvir. Og sigurin hjá vestmenningum kundi lættliga blivið uppaftur størri**




Hilmar Jan Hansen

Í longri tíð hava vestmenningar næstan fingið meira burturúr at lesa støðuna á Atlantic Airways-kappinginí á høvdinum, tí byrjanin hevur verið alt annað enn góð. Men nú er brádliga vent í holuni, og eftir útisigurin á StÍF í gjár, er VÍF nú næstfremst av teimum fimm liðunum, sum øll í einum stórum trunka jagstra Neistan, ið tykist vera í flokki fyri seg.

Strandingar, sum hesa ferð máttu lúta, vóru annars næstfremstir undan dystinum, men teir máttu bara ásanna, at hetta ikki ordiliga var teirra dagur. Hóast teir byrjaðu betur og gingu undan fyrstu løtuna í dystinum, megnaðu teir ongantíð at svara aftur, tá VÍF hevði tikið yvir.

Vestmenningar vunnu dystin við trimum málum, men sigurin kundi lættliga blivið uppaftur størri, tí bara í seinna hálvleiki vóru VÍF-arar púra leysir ímóti málinum og Marian Cirluganescu, men raktu ikki málið!

Fyrri hálvleikur var annars ógvuliga skiftandi, tí hóast liðini spældu sera góðan hondbólt í løtum, var eisini hurlivasi í viðhvørt, og ikki færri enn átta útvísingar fyrstu 30 minuttirnar. Í seinna hálvleiki komu fleiri aftrat, men tá var tó ikki so heitt inni á vøllinum, fyrr enn í allarseinastu minuttunum, tá Bárður Danielsen hjá StÍF fekk beinleiðis reytt kort fyri óregluliga at steðga einum skjótálopi hjá VÍF.

Bæði undir dystinum og eftir dystin vóru strandingar týðiliga ónøgdir við dómararnar, og tað kókaði næstan yvir ímóti endanum. Kanska StÍF tvørturímóti hevði hepni við sær, tí har vóru einar tvær støður fyrr í dystinum, at reyða kortið kundi verið komið fram…

### Ungar kreftir

Tær løturnar, tá allir partar fokuseraðu upp á sjálvt spælið, var tað viðhvørt ein fragd at síggja, og serliga í álopsspælinum skaraðu vestmenningar framúr, meðan StÍF hevði ilt við at finna upp á nakað annað, tá VÍF hevði valt at mansvard Cristian Preda, ið kortini gjørdist toppskjútti hjá StÍF. Tykist, sum StÍF henda dagin illa dugdi at fáa restina at rigga, tá rumenin varð tikin burturúr.

Hinvegin fekk VÍF nógv at rigga í sínum álopsspæli. Í seinna hálvleiki mansvardu strandingar Sámal Joensen nokk so nógv, men tað var nú ikki bara har, at stóra hóttanin frá vestmenningum lá, men eins nógv yviri í høgru síðu, har Joen Pauli Høgnesen á bakkinum og serliga Bjarti Hansen á vonginum skaraðu framúr, umframt at Áki G. Olsen var sera eyðsýndur.

Joen Pauli hevði ótakksomu uppgávuna at mansverja Preda í verjustøðu, men tað forðaði honum ikki í at brúka nógva orku í álopsspælinum, og Bjartur var fullkomuliga dominerandi inni á vonginum, umframt at hann eisini megnaði at fáa mál úr øðrum støðum.

Onkra løtuna var VÍF seks mál á odda, og her var eingin ivi um, at sigurin var fult og heilt uppiborin. Sum skiltist, máttu vestmenningar vera fleiri av sínum spælarum fyriuttan í gjár, men tað sást ikki aftur á vøllinum, har teir ungu góvu eina ábending um, at VÍF skjótt kann røkka hæddunum aftur.

Fyribils er tað blivið til næstfremsta plássið, sum tó er við sama stigatali sum StÍF og Kyndil, og eitt stig aftanfyri koma so H71 og KÍF.

### Fakta um dystin

**StÍF-VÍF 25-28 (10-13)**
**10 min:** 4-3
**20 min:** 7-8
**40 min:** 14-19
**50 min:** 20-24
**Málskjúttar**
**StÍF:** Cristian Preda 7, Gabriel Stanciu 6 (2), Jóannes Prestá 4, Mortan Hansen 3, Bárður Danielsen 2, Jógvan Berg 1, Borgar Danielsen 1, Pauli G. Hansen 1
**VÍF:** Bjarti Hansen 8, Áki G. Olsen 7 (1), Sámal Joensen 6 (1), Joen Pauli Høgnesen 3, Jákup Suni Andreasen 2, Sámal Jákup Djurhuus 2
**Brotskøst:** StÍF 6, VÍF 4
**Útvísingar:** StÍF 5, VÍF 7
**Reytt kort:** StÍF 1
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

### Stríðast fyri tí

– Hesi bæði stigini, vit vunnu í dag, hava nógv at siga fyri okkum. Nú er er øgiliga tætt, so her er einki avgjørt enn, men vit stíla sjálvandi ímóti einum finaluplássi, og nú sær bara gott út hjá okkum. Tað vísir seg, sum at vit í ár mugu stríðast eitt sindur meira fyri tí, enn vit eru vanir at skula, sigur Áki G. Olsen hjá VÍF.

– Strandingar byrjaðu betur, men vit fingu takið á teimum og hildu tað allan dystin á tamb. Eitt skifti vóru vit um reppið at geva teimum ein ordiligan endabrest, tí vit vóru nógv mál frammanfyri, men tað bleiv tað nú ikki til.

hil

### Órógvandi døming

– Fyrst og fremst virkaði álopsspælið hjá okkum ikki nóg væl, men eisini haldi eg, at vit í summum førum ikki høvdu dómararnar við okkum. Annars haldi eg, at bæði liðini spældu nokk so væl, sigur strikuspælarin hjá StÍF, Mortan Hansen.

– Tað tóktist, sum allar tær stóru avgerðirnar í dystinum fullu til fyrimuns fyri VÍF, meðan vit føldu okkum niðurdømdar og ikki komu uppaftur, tí vit kanska hugsaðu meira um dømingina enn um hondbóltsspælið. Høvdu vit fingið spælið hjá okkum at koyrt eitt sindur betur, hevði eingin munur verið á liðunum, og so kundu vit akkurát tað sama havt vunnið, men tað lukkaðist so ikki í dag.

hil